Stevnan byrjaði við lovsangi sum børnini stóðu fyri, tey spældu ljóðførini og sungu.
Tey yngstu vóru um 6/7 ára aldur. Tað var rørandi og stórt at uppliva.

Fyri nøkrum árum síðani var eg til eitt felags bønarmøti í Klaksvík. Ein av fyriskiparunum hevði eitt føroyakort við og legði tað á gólvið. Øll stillaðu seg rundanum og bóðu inn í ymisk økir.
Ein bøn, sum vaks upp í mínum hjarta tað kvøldið, var lovsangur frá børnum. Í børnum í øllum aldri, frá vøggustovu, barnagarði og uppeftir skuldi ein lovsongur vaksa fram.

Nakað av tí, vit upplivdu á stevnuni, vilja vit taka við okkum til barnamøtini. Serliga við lovsanginum, at fáa børnini meiri við í sanginum. Vit fara at gera eina roynd eina ferð um mánaðin, á møtunum millum kl.11.00 og 11.30 at fáa børnini fram við fløggum at syngja við.
Vit heita á samkomuna at stuðla okkum, at koma fram saman við okkum og børnunum.

Tá Jesus reið inn í Jerusalem róptu og sungu børnini „Hosianna, sonur Dávids“ teir leiðandi blivu illir og høvdu at Jesusi, men Jesus svarar teimum: „Hava tit aldri lisið hetta „av munni barna og bróstabarna hevur Tú fullkomið Tær lovsang“.

Minniversið vit hava fyri september mánað er Sálmur 143.10:

**Lær meg at gera vilja Tín, tí Tú ert Gud mín. Lat góða Anda Tín leiða meg.**

Vit vilja takka samkomuni fyri stuðulin til ráðstevnuna og gleða okkum at deila okkara upplivingar við børnunum og tykkum øllum. *Vh Conny*

### SAMKOMUDAGUR 7. SEPTEMBER Í SKÓTAHÚSINUM VIÐ LØKIN

So nærkast samkomudagurin, og vit gleða okkum til ein hugnaligan og avslappaðan dag saman.
Dagurin er ókeypis.

**Skráin fyri dagin er hendan:**

| | |
|---|---|
| Kl. 10 | Morgunmatur<br>Skattaveiða |
| Kl. 13 | Samanskotsmáltíð<br>Dansur |
| Kl. 15 | Kaffi, frugt<br>Spurnarkapping |
| Kl 18 | Døgurði við desert<br>Enda á leið kl 20 |

Tilmelding fer fram við at skriva, sms´a ella messenger hjá Nomi (tlf. 223299 mail: nomi@nomi.fo)
Eisini verður gjørdur ein innanhýsis fb bólkur, sum fer at eita „Filadelfia Innanhýsis"

Freistin at melda til er 3. september Eg koyri eisini hetta á fb bólkin, so fólk kunnu melda seg til.
*Nomi*



Filadelfia
*„Himmal á jørð“*

# Ongin *lítil* Heilagur Andi

Í juni mánað vóru Conny, Katy og Maiken til eina ráðstevnu hjá Eastgate í London.
Heitið á ráðstevnuni var NJHS – „No junior Holy Spirit“
Nógv gullkorn komu á túrunum – eitt av teimum var „it takes a church to raise a child“.
Rundan um hvørt barn eru fleiri vaksin, sum kunnu mynda framtíðina hjá barninum. Í eini kirkju eru fleiri ymisk menniskju, sum børnini kunnu spegla sær í.
Kirkjan er ikki eitt andaligt bíðirúm fyri børnini til tey blíva vaksin. Kirkjan er teirra andaliga heim. Her skulu tey mennast og styrkjast í trúnni, og vit sum kirkja skulu taka ímóti børnunum á sama hátt sum vit taka ímóti vaksnum.
*Framhald á s. 3*

## Samkomudagur við Løkin

Leygardagin 7. sept. verður samkomudagur, har vit fara at hugna okkum saman frá morgni til kvølds.
Vit gleða okkum til dagin, har ommur, abbar, foreldur og børn, fara at verða saman ein heilan dag, bara við hugna.
Vit fara at eta saman, spæla saman, dansa og syngja saman og hugna okkum max.
Hesin dagurin er fyri alla familjuna. Sí skrá á síðu 4.

## Barnamøti er hvønn sunnudag kl.11.30 til 12.45

Øll børn eru vælkomin.

Foreldur skulu vera við teimum smáu, sum ikki kunnu vera einsamøll.
Vit syngja, hoyra bíbliusøgu, biðja, práta, eta og ítriv og spæl.

# SEPTEMBER 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Sunnudagur | 1. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/Leiðari: Ása L.<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Ása O.<br>Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 2. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Ása O. |
| Mikudagur | 4. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 7. | | **Samkomudagur við Løkin**<br>**Reingerð:** Merlie og co. |
| Sunnudagur | 8. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Kári, Dávid og Nora<br>Ábyrgd/Leiðari: Tummas J.<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I<br>Uppvørpa: Jóel<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari: Kurt Christensen<br>Kaffivertar: Kári, Dávid og Nora |
| Mánadagur | 9. | Kl. 19.00 | **Felags bønarmøti í Miðvági**<br>Ábyrgd/leiðari: Vegurin |
| Mikudagur | 11. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 14. | | **Reingerð:** Malena og co. |
| Sunnudagur | 15. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti v. breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Fríðbjørn og Hildibrandur<br>Ábyrgd/leiðari: Mariann<br>Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Linda Maiken<br>Talari: Ólavur Jacobsen<br>Kaffivertar: Fríðbjørn og Hildibrandur |
| Mánadagur | 16. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Mariann |
| Mikudagur | 18. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 21. | Kl. 10.00 | **Reingerð:** Anna-May og co. |
| Sunnudagur | 22. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti – innsavnan til húsið**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: No-omi, Marner, Helen og Sjúrður<br>Ábyrgd/Leiðari: Sámuel<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I<br>Uppvørpa: Ása Elisabeth<br>Ljóðbland: Tummas D.<br>Tulkur: Høgni<br>Talari: Anna-May<br>Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 23. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin**<br>Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Mikudagur | 25. | Kl. 10.00 | **Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Leygardagur | 28. | | **Reingerð:** Nomi og co. |
| Sunnudagur | 29. | Kl. 11.00<br>Kl. 11.30 | **Morgunmøti við breyðbróting**<br>**Barnamøti**<br>Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild<br>Ábyrgd/Leiðari: Marner<br>Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II<br>Uppvørpa: Ragnar<br>Ljóðbland: Sjúrður<br>Tulkur: Ragnar<br>Talari:<br>Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 30. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn**<br>Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

„Opna títt vindeyga“ var eitt annað gullkorn. Lat onnur síggja og hoyra teg. Opna títt vindeyga so børnini síggja og hoyra trúnna í tær. Hetta er meir til foreldur, ommur og abbar, sum í dagligdegnum eru saman við børnunum. Ofta hava vit hoyrt vitnisburðar frá vaksnum sum søgdu frá, tá tey vóru børn og hoyrdu foreldur, ommur ella abbar biðja, hvussu tað rørdi tey.

Brúka allar møguleikar gjøgnum dagin og vís børnunum trúnna, t.d. tá tit koyra børnini í barnagarð ella skúla, biðið fyri degnum, at alt skal ganga væl. Biðið við børnunum tá tey leggjast og takið børnini við, tá biðið verður fyri sjúkum o.ø., latið Bíbliuna liggja opna á borðinum, so tey síggja, at tú lesur.

Í 5. Mós.6.7-9 stendur: *„tú skalt prenta tey inn í børn tíni við at tosa um tey, bæði táið tú situr heima við hús, og táið tú gongur á vegnum“* … tosa um trúnna.

*Framhald á s. 4*